# Tað fremsta inna

**Føroyska tónleikalívið verður væl umboða á AME tiltakinum í Norðurlandahúsinum. Eivør, Sic, Marius, Høgni Lisberg, 200, Deja Vu, Gestir og Lena Andersen umboða nógvar ymiskar greinar innan føroyskan tónleik. Her er talan um nakrar av okkara fremstu bólkum hvør á sínum øki.**



## Deja Vu

[myspace.com/dejavusite]

Deja Vu vann The Global Battle Of The Bands í Føroyum og við sigrinum rættin at luttaka á AME-Føroyar. Deja Vu var ein av bólkunum á fyrsta AME tiltakinum, umframt at bólkurin eisini spældi á AME Reykjavík í fjør. Somuleiðis hevur Deja Vu fleiri ferðir luttikið í Prix Føroyum.

Deja Vu fekk sítt veruliga gjøgnumbrot, tá bólkurin í 2003 gjørdist nummar tvey í Prix Føroyum. Fyrsta fløgan hjá bólkinum. A Place To Stand On kom út í 2005 og var m.a. vald ársins fløga av lesarum hjá Dimmalætting. Á Planet Awards var fløgan somuleiðis í uppskoti til bestu fløgu.

Tónleikurin hjá Deja Vu er ein sveimandi og droymandi streymur av tónum, ið dregur lurtaran inn í heimin hjá bólkinum. Teir skapa eina flotta ljóðmynd.

Teir báðir oddamenninir í Deja Vu, Líggjas og Flóvin, skiftast um leiklutin sum sangari. Bólkurin hevur spælt á flest øllum tónleikatiltøkum í Føroyum, og tað er greitt at bólkurin hevur vónir um at gerast kendur uttanfyri Føroyar. Í fjør taldist Deja Vu millum virknastu føroysku bólkarnar, við framførslum nærum hvørt vikuskiftið.



## Sic

[myspace.com/sicsix6]

Síðan Sic herfyri gav fløguna Pandemonium út, hevur bólkurin veruliga havt undanvind. Í føroyskum miðlum hevur fløgan fingið avbera góð ummælir og eisini uttanfyri klettarnar hevur áhugin fyri Sic verið stórur. Eitt nú hava tungmálmsmiðlar í so ymiskum londum sum Avstralia og Peru tikið tónleikin hjá Sic til sín. Avstralska promotion felagið Dark Kloud Promotions lýsir fløguna hjá SIC soleiðis:

"Í september 2006 fór Sic inn í sjúka og avskeplaða heimin hjá tónleikaframleiðaranum Tommy Hansen í Jailhouse Studios í Danmark. Teir 15 dagarnar, ið Sic brúktu til upptøkurnar av teimum 13 løgunum á fløguni, vóru ein ferð fyri lívið. Saman við Tommy góvu teir alt og meira enn tað og skaptu eitt meistaraverk - ein varða í tungmálmssøguni. Við útgávuni av Pandemoninum!, hevur SIC skapt eina nýggja byrjan, eina nýggja era."

Spanskmælta alnetstíðaritið og útvarpsstøðin Rockum, ið virkar úr Peru og gevur Sic 8,8 av 10 møguligum í karakter.

Sic hevur fimm ár á baki, men tað var ikki fyrr enn núverandi manning tók við, at Sic veruliga fór at gera um seg. Við Pandemonium hevur Sic skrivað seg inn í føroyska tónleikasøgu. Útgávan er framúrskarandi og brýtur uppúr nýggjum innan føroyskan tónleik, her er talan um sera vakran larm.



## 200

[myspace.com/200baby]

Tá 200 sá dagsins ljós, vóru tað neyvan nógv í tordu at spáa bólkinum handan eksperimenterandi lagið "Vit eru 200", eina so bjarta framtíð, sum bólkurin fekk. Frítíðarverkætlanin hjá teimum trimum Niels, Una og Mikael gjørdist ein av Føroya fremstu bólkum. Eftir at Niels og Uni høvdu lagt bólkin Mold til hvíldar, uppfunnu teir saman við Mikael konseptið loysingarpunk ein tónleikastílur, ið onkur hevur lýst, sum politiskan punkrokk við Elvis vokali. Stutt sagt, 200 hevur sítt heilt egna ljóð. Hetta er tónleikur við sterkum meiningum.

Eitt av høvuðsendamálunum við AME er at varpa ljós á føroyskan tónleik, og vísa okkara bestu tónleikanøvn fram fyri tónleikaídnaðinum í øðrum londum. Við fløguni Graceland og framførslum á festivalum sum Roskilde, Spot, Iceland Airwaves, By:Larm, Larm og Umeå Open er 200 vorðið eitt tað føroyska navnið, ið hevur vakt størst ans uttanlands, tí er bólkurin eisini eitt upplagt navn á AME. Stóra danska konsertfyriskiparafyritøkan DKB Motor hevur tikið 200 undir sínar veingir, og hetta hevur gjørt undurverkir. Leysasøgur hava gingið um luttøku á Roskilde Festivalinum í ár, men hetta fæst eingin í 200 at vátta. Men eftir at bólkurin í almenna festival blaðnum í fjør fekk eitt tað besta ummælið á øllum festivalinum, so er hetta als ikki óhugsandi. Bólkurin vann Planet Awards fyri besta bólk í fjør, og var í ár í uppskoti til somu heiðursløn, umframt at vera í uppskotið til heiðurin ársins fløga hjá Dimmalætting í ár.



## Gestir

[myspace.com/gestir]

Prix Føroyar vinnararnir frá 2003 risu sera skjótt ovast upp á føroyska tónleikatindin, frá at vera ein heilt ókendur og nýggjur bólkur, var bólkurin knappiliga millum fremstu føroysku tónleikanøvnini, við luttøku á festivalum, konsertum og á Listastevnuni. Sigurin í Prix Føroyum gav bólkinum møguleika at fara í upptøkuhøli. Leiðin gekk til Jútlands, har bólkurin spældi inn í víðagitnu Lundgaard upptøkuhølunum. Tað gingu tó yvir trý ár, áðrenn fyrsta fløgan hjá Gestum kom út. Tíðin hevur ment bólkin, og fyrsta útgávan, Burtur frá toftunum verður av flestu ummælarum mett sum eitt meistaraverk. Fløgan hevur fingið avbera góð ummælir.

Eisini á konsertum er bólkurin vorðin ein av bestu føroysku bólkunum. Gestir hava luttikið á AME tiltøkum í Føroyum, á báðum AME tiltøkunum í Vega í Keypmannahavn umframt á AME-Reykjavík í fjør og aftur í ár. Herfyri skrivaðu Gestir undir umboðssáttmála við umboðsstovuna Plan C, við Christian Ulf-Hansen og Sam Blue, ið eisini umboðar Teit. Bólkurin hevur eisini gjørt avtalu við booking agentin hjá Teiti, Ulrich Lauridsen frá Glorious Records & Music Managment.